FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

## Mannagongd fyri val av starvsfólki í stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya

Samsvarandi § 9 í løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya verður boðað frá, at mannagongdin fyri vali av starvsfólki sum umboð í stýrið verður henda:

1. Starvsfólk verða vald fyri 4 ár í senn. Fjórða hvørt ár verður skipað fyri vali.

2. Øll fólk í føstum starvi á setrinum hava rætt til at velja 2 umboð í stýrið og 2 varastýrislimir.

3. Øll, sum eru í føstum starvi tann fyrsta í mánaðinum, sum valið fer fram, og sum eru sett minst hálva tíð, hava valrætt og eru valbær, íroknað adjunktar og ph.d. lesandi.

4. Rektarin setir valnevnd.

5. Rektarin ásetir valdagin eftir tilmæli frá valnevndini.

6. Valnevndin ger yvirlit yvir tey fólk, sum hava valrætt. Valnevndin ger ein felagslista yvir tey starvsfólk, sum hava valrætt.

7. Starvsfólk, ið ynskja at stilla upp til val, lata rektaranum váttan í seinasta lagi 3 vikur áðrenn valdagin. Tá freistin er farin, ger Setursskrivstovan ein vallista, sum verður latin rektaranum.

8. So skjótt rektarin hevur góðkent vallistan, verður hann kunngjørdur á heimasíðum setursins og á sjónligum staði á deildum setursins.

9. Starvsfólkini hava loyvi til at seta kross við upp til tveir persónar á listanum.

10. Valnevndin telur upp atkvøðurnar.

11. Tey fyrst valdu á listanum verða stýrislimir, og triðji- og fjórðvaldi verða varalimir.

12. Valúrslitið verður kunngjørt seinast 3 yrkadagar eftir, at valið er avgreitt.

13. Kæra um hildið val skal skrivliga, innan 3 yrkadagar eftir at úrslitið er kunngjørt, av hvørjum valførum persóni verða latin rektara, sum saman við valnevndini tekur støðu til kæruna innan 1 viku. Avgerð teirra er endalig.

Oktober 2016
Stýrið fyri Fróðskaparsetur Føroya